# Viðgerð av persónsupplýsingum

Sernám viðger persónsupplýsingar hjá borgarum fyri at kunna útinna lógarásettar og umsitingarligar uppgávur.

## Dátuábyrgdarar:

Sernám, á Frælsinum 32, 100 Tórshavn, telefon 360200, teldupostur sernam@sernam.fo

**Dátuverndarfólk (DPO):**

Katrin Jacobsen, løgfrøðingur í Barna- og undirvísingarmálaráðnum, teldupostur katrinj@bumr.fo, telefon 555055.

Sernám leggur dent á, at viðgerðin er greið og trygg, og at borgararnir kenna síni rættindi.

Niðanfyri kanst tú lesa um hesi rættindi og um viðgerð av persónsupplýsingum.

## Skráseting av persónsupplýsingum

Sernám viðgerð persónsupplýsingar, fyri at kunna útinna tær uppgávur stovnurin hevur at røkja, sum eru at ráðgeva dagstovnum og skúlum, umframt foreldrum at skrásetta.

Persónsupplýsingar vera fingnir til vega við egnum upplýsningum latnir okkum, oyðiblað, sent okkum umvegis post og teldupost.

Sernám samstarvar við nógvar ymiskar stovnar, sum varða av børnum og ungum. Eingir upplýsingar fara millum hesar stovnar uttan samtykki.

**Hvør fær upplýsningar?**

Sernám letur upplýsningar viðvíkjandi starvsfólkum til Gjaldstovuna í mun til lønir.

**Hvussu leingi verða upplýsingar goymdar?**

Persónsupplýsingar vera goymdir so leingi hesir tæna einum sakligum endamáli. Endaligar ásetingar og mannagongdir um striking av persónsupplýsingum verður viðgjørt í løtuni.

**Tíni rættindi:**

Tú hevur fleiri rættindi, tá ið Sernám viðger persónsupplýsingar um teg.

Tú hevur sum útgangsstøði rætt til innlit í viðgerð hjá Sernámi av persónsupplýsingum um teg. Tað merkir, at tú hevur rætt til at fáa staðfest, um persónsupplýsingar um teg verða viðgjørdar, og tú hevur eisini rætt til at fáa innlit í onnur viðurskifti kring upplýsingarnar, til dømis hvussu leingi tær verða varðveittar, og hvønn tær verða víðarigivnar til.

**Rættindi til rætting og striking**
Um tær upplýsingarnar, sum vit viðgera, eru skeivar, ófullfíggjaðar ella óviðkomandi so kanst tú, sum skrásettur og /ella foreldramyndugleiki, við teimum avmarkingum, sum eru í galdandi lóggávu krevja, at vit rætta ella strika upplýsingarnar.

**Rættindi til at mótmæla**
Tú kanst mótmæla, at persónsupplýsingar um teg verða viðgjørdar. Um mótmælið má metast heimilað, skulu persónsupplýsingarnar um teg ikki viðgerast

**Rættindi til dátuflutning**
Tú hevur rætt til at fáa persónsupplýsingar tínar útflýggjaðar í einum skipaðum, vanligum og teldutøkum sniði og at flyta tær frá einum dátuábyrgdara til annan uttan forðingar, um so er, at viðgerðin av persónsupplýsingunum er grundað á samtykki frá tær ella avtalu við teg

**Tú kanst kæra**

Dátueftirlitið hevur eftirlit við, at galdandi lógir og reglur á dátuverndarøkinum verða fylgdar. Tú kanst kæra viðgerð hjá Sernámi av persónsupplýsingum um teg til Dátueftirlitið.

Tú finnur upplýsingar um Dátaeftirlitið á heimasíðuni www.dat.fo